## Oljudálking við Írland

Í Írlandi hevur stjórnin givið vaktar- og bjargingartænastuni boð um at halda eyga við einum oljubletti, sum rekur inn ímóti strondini har suðuri í landinum. Sambært myndugleikunum er oljubletturin tann største á hesum leiðum í meiri enn tíggju ár. Írsku myndugleikarnir vilja vera við, at oljan fór í havið, tá ein russiskur flogberi bunkraði olju úr einum tangaskipi á leiðini millum bretsku vesturstrondina og írsku suðurstrondina. Myndugleikarnir stúra fyri, at umleið 500 tons av olju kunnu reka inn á land.




## Tjóðartaka banka

Týska stjórnin umhugsar at biðja Samveldiisdagin samtykkja eina lóg, sum skal heimila stjórnini at leggja hald á partabrøv í bankum, sum koma í fíggjarligar trupulleikar. Stjórnin sigur tiltakið vera neyðugt fyri at verja bankarnar. Týskir fjølmiðlar siga, at lógin skal í fyrsta umfari geva stjórnini heimild til at tjóðartaka bankan Hypo Real Estate, sum er í álvarssomum trupulleikum. Sambært DPA leggur stjórnin seinastu hond á sjálvt uppskotið í dag, og tað skal so fyri tingið.

## Autistur má víkja

**Fyri at teir tríggir íbúgvarnir í Pætursgøtu kunnu flyta inn í Svanga, noyðist ein autistur at flyta úr sambýlinum**

PÆTURSGØTA 3
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Joan Michelsen úr Sørvági eigur eina dóttir, sum er búsitandi í sambýlinum í Svanga, har teir tríggir íbúgvarnir við Aspergers sjúkuni eftir ætlan skulu flyta inn. Tað er kunngjørt, at tveir av teimum skulu inn á niðastu hædd at búgva, og har býr frammanundan ein genta við autismu. Hon er uppsøgd, og hevur fingið bjóðað at flyta inn í Verkhúsið í Sørvági at búgva.

Foreldrini mótmæla flytingini, men ynskja ikki at viðmerkja málið í dag.

Nærverkið ynskir heldur ikki at viðmerkja einstaka persónsmálið.

# Skjótt at bróta tað góða niður

**Landsstýriskvinnan í almannamálum fer í dag á fund við Javna og tey avvarðandi at íbúgvunum í Pætursgøtu. Ein teirra er Anna Maria Kallsberg, sum hevur ringar vónir til fundin. – Tað er so skjótt at bróta tað góða niður. Og tað má ikki henda. Tað er mín bøn, sigur hon**

PÆTURSGØTA 3
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Anna Maria Kallsberg er mamma at Niels Heðin Gaard Joensen. 27 ára gamli Niels Heðin Gaard Joensen fekk sum 12 ára gamal staðfest Asperger sjúkuna, og fyri familjuna hevur tað verið strævið at vunnið honum passandi sømdir. Eftir fyrst at hava búð í ungdómssambýlinum, Lonini á Barnaheiminum, flutti hann inn á sambýlið á Pætursgøtu 3 í Hoyvík. Og tað hevur verið júst tað rætta fyri hann.

- Vit hava í so nógv ár stríðst fyri einum heimi fyri Niels Heðin, og onnur við Aspergers sjúkuni. Tað riggaði væl í skúlanum hjá nunnunum, til tey brádliga tóku tann væl virkandi stuðulin frá honum. Tað var so skjótt at bróta tað niður, sum riggaði væl, sigur Anna Maria Kallsberg, sum má sita og hyggja at, meðan teppið enn eina ferð verður hálað undan teimum, og heimið hjá soni hennara verður tikið frá honum.

- Niels Heðin er ikki sami sonur, sum í 2000 fór í sambýlið á Pætursgøtu at búgva. Hann hevur fingið tað so nógv betri har. Eg minnist at hann fyrr altíð var so bangin fyri at halda føðingardag, tá hann búði heima, tí hann treivst ikki við so nógvum fólki rundan um seg um somu tíð. Og tí hevur hann fingið møguleika at arbeiða við í sambýlinum á Pætursgøtu, greiðir Anna Maria Kallsberg frá.

### Teir passa ikki inn í Svanga

Klokkan 15 í dag skal hon saman við øðrum avvarðandi og Javna á fund við landsstýriskvinnuna í almannamálum, um flytingina av íbúgvunum á Pætursgøtu. Teir skulu eftir ætlan flyta inn í sambýlið í Svanga í staðin. Frammanundan búgva evnaveik í sambýlinum.

- Vónirnar eru ikki góðar. Eg, sum mamma havi ikki góðar vónir. Hetta slítur fullkomiliga uppá ein. Vit hava verið og hugt eftir nýggja bústaðnum, og eg má siga, at teir passa ikki inn har. Ivaleyst eru íbúgvarnar, sum búgva har fittir, men tey eru so veik.

Niels Heðin Gaard Joensen er ein væl virkandi persónur við Aspergers sjúkuni. Men hann er væl vitandi um, at hann krevur nógv av sínum umhvørvi. Hann harmast í Sosialinum í gjár um at heimið hjá honum verður spart burtur. Fyri familju hansara hevur sambýlið í Pætursgøtu alt at siga.

- Hetta má ikki koma fyri. Tað er mín bøn, sigur Anna Maria Kallsberg.



# Avgerðin er fakliga forsvarlig



**Mary í Garði, stjóri í Nærverk, heldur fast um avgerðina at spara burtur sambýlið í Pætursgøtu 3. – Avgerðin er fakliga forsvarlig. Vit hava lagt okkum eftir at sparingar skulu raka so fá sum gjørligt. Tí letur Pætursgøta aftur, sigur hon**

PÆTURSGØTA 3
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Nærverkið hevur mett um hvat sambýli undir stovninum verður minst merkt av sparingum, og er tí komið við tilmæli til landsstýriskvinnuna í almannamálum, um at lata aftur sambýlið í Pætursgøtu. Mary í Garði, stjóri á Nærverk, verjir tilmælið frá stovninum, og metir avgerðina at vera fakliga forsvarliga.

- Vit ásanna at hetta er álvarsligt, men vit kunnu fakliga standa inni fyri avgerðini um at lata aftur sambýlið í Pætursgøtu. Vit hava lagt dent á at búfólkini skulu merkja sum minst til sparingarnar, og hava tí avgjørt at flyta tey trý búfólkini saman inn á nýggja bústaðin, sigur Mary í Garði.

Nærverkið hevur mett, at sparingar verða best framdar við hesi loysnini. Pætursgøta 3 er ein lítil stovnur við trimum búfólkum, men hann er dýrur at reka, sum smáir stovnar ofta eru. Av tí sama eru stovnarnir eisini sera sárbarir. Tann besta loysnin vildi sambært Mary í Garði verið, at bygt fleiri eindir til endamálið, um raksturin skal vera rationellur.

Tey, ið hava mett um bestu loysnina, eru námsfrøðingar innan Trivnaðartænastuna, og stjórin tvíheldur um at avgerðin er fakliga forsvarlig.

- Vit fara at kýta okkum fyri at fáa umrokeringina at rigga, sigur hon.

Hon sigur samstundis, at einki útboð er til fólk, ið ynskja at sleppa inn á sambýlið. Tilboð verða givin eftir plássi, og ikki eftir tørvi.

- Men vit royna sum frægast at sleppa undan afturstigum á økinum, og royna at sleppa undan teimum alt ov pínufullu samanstoytunum. Avgerðin um at spara, er politisk, og vit hava so gjørt eina spariætlan, og hetta er eitt úrslit av tí.